

# Dátueftirlitið

## Ársfrágreiðing 2017


010101

# INNIHALD


**1. Fororð** 5

**2. Dátueftirlitið** 8
- 2.1 Játtanin á løgtingsfíggjarlógini 9
- 2.2 Lógargrundarlagið 9
- 2.3 Uppgávan hjá Dátueftirlitinum 9

**3. Virksemi í 2017** 11
- 3.1 Eftirlit 12
- 3.2 Hagtøl 12
- 3.3 Munnligir fyrispurningar 15
- 3.4 Loyvir og fráboðanir 16
  - 3.4.1 Loyvir til verkætlanir 17
  - 3.4.2 Verkætlan: Tidlig indsats mod perinatal angst og depression på Færøerne – en tværsektorel Shared Care-organisering 17
  - 3.4.3 Verkætlan: Einkjustøðan hjá eldri í Føroyum 17
  - 3.4.4 Verkætlan: Forsagnir um heilsu og andsevnir hjá eldri føroyingum 18
  - 3.4.5. Verkætlan: Registarakanning: Demens epidemiologi í Føroyum 18
  - 3.4.6 Verkætlan: Egenomsorg og hjertesvigt 18
  - 3.4.7 Verkætlan: Parkinson sjúka í Føroyum – ein langtíðarkanning 18
  - 3.4.8 Verkætlan: Demens/Alzheimers sjúka í Føroyum – ein genetisk, umhvørvis og ættarbands kanning 19
  - 3.4.9 Verkætlan: Verkætlanin er ein samstarvsverkætlan millum Heilsu- og umsorganartænastuna hjá Tórshavnar kommunu og Sjúkrafrøðideildina á Setrinum í Føroyum 19
  - 3.4.10 Verkætlan: Deskriptiv tvørsnitkanning, spurnablaðskanning 19
  - 3.4.11 Verkætlan: Ændringer i kropsvægt, livskvalitet, muskelstyrke og dagligdags aktiviteter 20
  - 3.4.12 Verkætlan: BiFaSeps Biomarkers Faroe Islands Sepsis study 20
  - 3.4.13 Verkætlan: Aðrar verkætlanir, sum ikki hava kravt loyvi frá Dátueftirlitinum 20
  - 3.4.14 Ílegusavnið (Fráboðaðar granskingarverkætlanir) 20
- 3.5 Hoyringar 21
  - 3.5.1 Lógaruppskot 21
  - 3.5.2 Kunngerðir 21
  - 3.5.3 KT-politikkur 21
- 3.6 Vegleiðingar 21

**4. Ávís útvald mál í 2017** 22
- 4.1 Ymisk mál 22
  - 4.1.1 Trygt samskifti hjá kommunulæknum, sjúkrahúsum o.ø. 22
  - 4.1.2 Viðgerð av viðkvæmum persónsupplýsingum 23
  - 4.1.3 Sportøkni í bussum 23
  - 4.1.4 Fyrispurningur frá skúla um víðarilatan av persónsupplýsingum 24
  - 4.1.5 Skráseting av oljutangum 24
  - 4.1.6 Myndatøkur í sambandi við ítróttarvenjingar 25
  - 4.1.7 Vakmyndatól á Tórsvølli 26
  - 4.1.8 Skráseting av tjóðskapi hjá starvsfólki 26
  - 4.1.9 Nýtsla ella víðarinýtsla av persónsupplýsingum 27
  - 4.1.10 Innlit í samrøður og SMS hjá starvsfólkum, ið hava arbeiðstelefon 28
  - 4.1.11 Kæra um nýtslu av vakmyndatólum á bensinstøð 29
- 4.2 Mál tikin upp av egnum ávum 30

**5. Altjóða samstarv** 32
- 5.1 Triðjalandsgóðkenning frá ES-nevndini 32

**6. Eftirlit í 2017** 33

101010

# :://1 FORORÐ 2017

Við hesum letur Dátueftirlitið ársfrágreiðing sína fyri 2017 úr hondum.

Ársfrágreiðing verður skrivað sbrt. § 37, nr. 8, í persónsupplýsingarlógini, og er ætlað almenninginum.

Í ársfrágreiðingini er ein lýsing av virkseminum hjá Dátueftirlitinum í árinum 2017.

Í 2017 vórðu skrásett 217 nýggj mál. Í mun til 2016 er talið av skrásettum málum lækkað nakað, og var árið merkt av, at neyðugt var at seta meira tíð av til størri eftirlitsmál. Munnligu fyrispurningarnir vóru 118 í tali. Í 2016 var hetta talið 149.

Eftirlit er ein samantvinnaður partur av arbeiðinum hjá Dátueftirlitinum. Arbeiðið verður í størstan mun gjørt sum skriviborðs-eftirlit. Í 2017 vórðu framd fleiri slík eftirlit. Hesi verða ikki framd á staðnum, men umvegis skrivligt samskifti og fundir, har Dátueftirlitið fær KT-trygdarskoðanir og mannagongdir frá dátuábyrgdarunum. Seinni árini hevur Dátueftirlitið raðfest eftirlitsarbeiðið.

Dátueftirlitið tók í hesum sambandi nøkur mál upp av egnum ávum og kannaði, við støði í trygdarkunngerðini, t.e. kunngerð nr. 28 frá 27. februar 2003, heilt ella partvíst KT-trygdina hjá stovnum og virkjum í Føroyum, m.o. Strandfaraskip Landsins, Vinnuháskúlan, TAKS/Tolleftirlitið, Landssjúkrahúsið, umframt peningastovnar og tryggingarfeløg.

Slík mál eru tíðarkrevjandi at viðgera, og nøkur av hesum eftirlitsmálum eru tí enn undir viðger á Dátueftirlitinum.

Skal tann týdningarmiklasti parturin av arbeiði Dátueftirlitisins, sum er eftirlitsarbeiði, halda fram og styrkjast er neyðugt, at arbeiðsorka stovnsins verður økt, bæði við fólki, sum hevur tøkniligan førleika, og juristum.

Umframt er stórur tørvur á meira kunning um vernd av persónsupplýsingum. Hetta sæst, tí at eftirlitini, sum Dátueftirlitið ger, vísa, at til-vitanin um økið eigur at vera munandi størri, og Dátueftirlitið heldur tað vera umráðandi at raðfesta hetta arbeiði. Eitt arbeiðið, ið eisini er álagt Dátueftirlitinum í persónsupplýsingar-lógini. Skal slíkt kunningararbeiði eydnast, er neyðugt, at eitt skikkað starvsfólk verður sett í starv á Dátueftirlitinum til at taka sær av hesum.

Øll Dátueftirlit í norðurlondum hava á leið somu uppgávur sambært lóg, og øll uttan vit í Føroyum, hava ein starvsfólkahóp, sum umframt juristar, telur fólk við KT kunnleika og fjølmiðlakunnleika.

Dátueftirlitið hevur í fleiri umførum gjørt Løgmansskrivstovuni, ið varðar av játtan Dátueftirlitisins, greitt, at stovninum tørvar hægri játtan. Játtanin er tó enn tann sama, sum tann, ið tillutað varð Dátueftirlitinum í 2011 – 2 milliónir krónur.

Henda játtan røkkur bert til 2,8 starvsfólk.

Føroyar fingu í 2010 eina triðjalandsgóð-kenning frá ES í sambandi við flutning av persónsupplýsingum tvørtur um landamørk.

101010

Góðkenningin merkir, at Føroyar koma á yvirlitið yvir trygg triðjalond, og at ES metir Føroyar vera eitt land, sum á persónsupplýsingarøkinum verjir grundleggjandi demokratisk rættindi í einum nútímans talgildum samfelag. Hetta er ikki einans fremjandi, men neyðugt fyri at vinnan, gransking o.a. skal virka í einum nútíðarsamfelag.

ES-góðkenningin setir størri krøv til eftirlitsarbeiði hjá Dátueftirlitinum, og tað er ongin ivi um, at krøvini til eftirlitið við viðgerð av persónsupplýsingum fara at vera alsamt meira herd í framtíðini. Eitt nú mongu gølurnar, ið verið hava seinnu árini, har persónsupplýsingar eru farnar á skeivar hendur, eru seldar og óheimilað nýttar osfr., gera, at krøvini til vernd av persónsupplýsingum verða herd.

Hetta sæst eisini aftur í nýggju ES-fyriskipanini, sum kom í gildi í ES londunum tann 25. mai í ár. Fyriskipanin herðir krøvini til KT-trygd og eftirlit, og heimilar, at stórar bøtur kunnu verða givnar fyri brot á persónsupplýsingarlógirnar í ES. Við tað at Føroyar hava her nevndu triðjalandsgóðkenning, sum ger, at borgarar í ES kunnu kenna seg tryggar við at lata sínar persónsupplýsingar til viðgerðar í Føroyum, mugu vit, um vit ætla okkum at varðveita hesa, lúka tær treytir, sum ES setir til triðjalond. Tað er tí sannlíkt, at ES í næstum, í kjalarvørrinum av nýggju lóggávuni, fer at kanna, hvør støðan hjá Dátueftirlitunum í triðjalondum er.

Í londunum uttan um okkum eru Dátueftirlitini longu farin at arbeiða eftir nýggju reglunum, og bæði í Danmark og í Íslandi eru játtanirnar til Dátueftirlitini har øktar seinnu tíðina, og fleiri fólk eru sett til at gera eftirlits- og kunningararbeiði.

Dátueftirlitið luttekur á teimum seminarum og ráðstevnum, sum eru á persónsupplýsingarøkinum í sambandi við nýggju ES-fyriskipanina. Sera týdningarmikið er at ansa eftir, at persónsupplýsingarlógin í Føroyum framvegis verður soleiðis, at vit kunnu varðveita triðjalandsgóðkenningina, vit hava frá ES.

Løgmansskrivstovan er tí farin undir at gera nýggja føroyska persónsupplýsingarlóg. Henda lóg verður gjørd við støði í nýggju donsku persónsupplýsingarlógini, sum er gjørd í samsvari við ES fyriskipanina. Harvið fáa vit eina føroyska persónsupplýsingarlóg, sum í stóran mun er í samsvari við galdandi ES rætt á økinum. Um vit eisini fáa eitt Dátueftirlit, ið samsvarar dátueftirlitunum í ES-londunum og londunum uttan um okkum, fer tíðin at vísa.

Sambært ES fyriskipanini skulu tey lond, sum hava eina triðjalandsgóðkenning, áðrenn 2022 fáa at vita frá ES, undir hvørjum treytum tey kunnu varðveita ES góðkenningina. Vit kenna, sum er, ikki hvørjar treytirnar vera, men at vit kunnu vísa á, at vit í Føroyum hava dagført okkara persónsupplýsingarlóg, er uttan iva ein fyrimunur í tí sambandinum.

Tórshavn, 20. juni 2018

Eyðbjørn Larsen
*Formaður í Dáturáðnum*

Eyðhild Skaalum
*Stjóri í Dátueftirlitinum*

# :://2 DÁTUEFTIRLITIÐ

Dátueftirlitið er ein óheftur fyrisitingarligur myndugleiki, hvørs avgerðir eru endaligar innan fyrisitingina. Dátueftirlitið hevur fíggjarligt tilknýti til Løgmansskrivstovuna, men er í virksemi sínum óheft.

Dátueftirlitið vísir til Løgmansskrivstovuna, tá um játtan og lógarsmíð ræður, t.e. at løgmaður hevur fyrisitingarheimild, men kann ikki geva eftirlitinum tænastuboð, sí málsøkjafráboðanina og persónsupplýsingarlógina.

Dátueftirlitið umsitur Løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, sum broytt við Ll. nr. 24 frá 17. mai 2004. Lógin verður vanliga nevnd persónsupplýsingarlógin.

Dátueftirlitið er sostatt hægsti fyrisitingarligi myndugleiki í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum.



Dátueftirlitið hevur virkað síðan 1. januar 2002, tá persónsupplýsingarlógin kom í gildi. Dátueftirlitið er skipað við Dáturáði, sum verður valt av løgmanni, og skrivstovu. Limirnir í Dáturáðnum eru persónliga valdir, og formaðurin skal vera løgfrøðingur. Limirnir verða valdir fyri fýra ár í senn, og somuleiðis verða varalimir valdir fyri fýra ár.

**Limirnir í Dáturáðnum 2016-2020:**
Sambært § 36, stk. 3, í persónsupplýsingarlógini, setti løgmaður tann 1. november 2016 nýggjar limir í Dáturáðið. Samstundis eru varalimir valdir.

**Í Dáturáðnum sita:**
Eyðbjørn Larsen, advokatur, formaður
*Varalimur: Rannvá Sólheim, løgfrøðingur*
Óli Simonsen, KT-leiðari.
*Varalimur: Ólavur Ellefsen, stjóri*
Maria Dam, deildarleiðari
*Varalimur: Rudi Kollslíð, lækni*

Valskeiðið hjá Dáturáðnum er 4 ár og gongur út 1. november 2020.

**Skrivstovan:**
Á skrivstovuni starvast trý fólk, ein stjóri, ein løgfrøðingur og ein skrivari.

Dátueftirlitið heldur til í egnum skrivstovuhølum. Bústaðurin er Reyngøta 33, Tinganes.

## 2.1. JÁTTANIN Á LØGTINGSFÍGGJARLÓGINI

Játtanin hjá Dátueftirlitinum á løgtingsfíggjarlógini í 2017 var kr. 2.000.000,-.

Niðanfyri er ein útgreining av fíggjarjáttanini hjá Dátueftirlitinum fyri árini 2015-2017.

## 2.2. LÓGARGRUNDARLAGIÐ HJÁ DÁTUEFTIRLITINUM

**Í 2017 vóru hesar reglur galdandi:**

- Løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, sum broytt við Løgtingslóg nr. 24 frá 17. mai 2004, (Persónsupplýsingarlógin).
- Kunngerð nr. 28 frá 27. februar 2003 um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum, (Trygdarkunngerðin).
- Kunngerð nr. 33 frá 11. apríl 2005 um at flyta persónsupplýsingar av landinum uttan loyvi frá Dátueftirlitinum.
- Kunngerð nr. 124 frá 19. september 2011 um fráboðanarskyldu og undantøk frá reglunum um viðgerðarloyvi.
- Reglugerð fyri Dáturáðið, dagfest 14. juni 2007.
- Innanhýsis roknskaparreglugerð, góðkend av Løgmansskrivstovuni hin 30. januar 2014.

## 2.3. UPPGÁVAN HJÁ DÁTUEFTIRLITINUM

Uppgávan hjá Dátueftirlitinum er at umsita persónsupplýsingarlógina. Sambært § 37 í lógini skal Dátueftirlitið:

- av sínum eintingum, ella eftir klagu frá skrásetta, ansa eftir, at viðgerð av persónsupplýsingum bert fer fram í samsvari við lógina og tær reglur, sum ásettar eru sambært lógini,
- viðgera fráboðanir og umsóknir um loyvi og áleggja treytir sambært lógarheimild,
- hava ein skipaðan almennan lista yvir allar fráboðanir og loyvir sambært lógini,
- geva ummæli til ætlaða lóggávu, sum viðvíkur persónsupplýsingum,
- gera kanningar, har persónsupplýsingar verða viðgjørdar,
- vegleiða privatum og tí almenna í ivamálum og virka fyri, at upplýsingar verða viðgjørdar sambært góðum dátuviðgerðarsiði,
- fylgja við í og kunna um gongdina í viðgerðini av persónsupplýsingum her á landi og uttanlands, og
- gera ársfrágreiðing

Dátueftirlitið er ein eftirlitsmyndugleiki, sum skal tryggja, at persónsupplýsingarlógin verður hildin, og Dátueftirlitið hevur víðar heimildir til tess at tryggja, at reglurnar í lógini verða hildnar.

Dátueftirlitið hevur heimild til at gera kanningar á staðnum, og hevur til eina og hvørja tíð, uttan dómsskurð atgongd til øll høli, haðani persónsupplýsingar verða viðgjørdar ella goymdar, og til øll høli, har persónsupplýsingarnar ella teknisk hjálparamboð verða goymd ella nýtt.

Brot á lógina kunnu verða revsað sbr. §§ 44 og 45 í persónsupplýsingarlógini.

DÁTUEFTIRLITIÐ

**Fíggjarjáttanin hjá Dátueftirlitinum fyri 2015 - 2017**

| *Sundurgreinað ætlan*<br>Tús. kr. | **2015**<br>**J** | **2016**<br>**J** | **2017**<br>**J** |
|---|---|---|---|
| **Nettoútreiðslujáttan** | **2.000** | **2.000** | **2.000** |
| Lønir o.a. | 1.640 | 1.640 | 1.640 |
| Keyp av vørum og tænastum | 270 | 270 | 270 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 80 | 80 | 80 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 10 | 10 | 10 |

://

Dátueftirlitið virkar á einum øki, har tøkniliga menningin gongur skjótt fyri seg, og stinga nýggir trupulleikar og øki seg javnan upp.



# :// 3 VIRKSEMI Í 2017

Dátueftirlitið hevur í 2017 m.a. viðgjørt hesi sløg av málum:

- viðgjørt umsóknir um loyvir og fráboðanir
- vegleitt og ráðgivið almennum myndugleikum, fyritøkum og privatpersónum
- viðgjørt kærur um viðgerð av persónsupplýsingum
- framt skriviborðseftirlit og sett fyrispurningar um KT-trygd til stovnar og fyritøkur
- svarað munnligum og skrivligum fyrispurningum
- ummælt uppskot til nýggja lóggávu
- tikið mál upp av egnum ávum

Dátueftirlitið virkar á einum øki, har tøkniliga menningin er ein týðandi táttur, og stinga nýggir trupulleikar og øki seg javnan upp. Tískil er neyðugt at menna nýggjar mannagongdir á økinum, og í hesum sambandi er neyðugt at fylgja væl við gongdini í grannalondunum.

Uppgávurnar hjá Dátueftirlitinum eru nógvar, og málsviðgerðin er fjøltáttað. Harumframt er økið í vøkstri og støðugari broyting, og tí er stórur tørvur á, at Dátueftirlitið við upplýsing og vegleiðing virkar fyri, at persónsupplýsingar verða viðgjørdar sambært góðum dátuviðgerðarsiði.

Fyrispurningar kunnu vera á nógvum ymiskum økjum, men til tíðir eru afturvendandi fyrispurningar. Afturvendandi fyrispurningar hava í 2017 serliga verið um hesi evni:

- P-talið
- KT-trygd, heruppií serliga krøv við atliti at trygdarkunngerðini
- Innlit
- Handfaring hjá arbeiðsgevarum av teldupostkassa hjá starvsfólki, sum eru farin úr starvi
- Facebook og onnur sosial netverk
- Samankoyring av ymiskum skipanum
- Telefonsamskifti hjá starvsfólkum
- Loyvi til verkætlanir og ymiskar nøgdsemis- og heilsukanningar
- Vakmyndatól
- Annað

Dátueftirlitið fær javnan fyrispurningar frá borgarum í Føroyum um sosialu netmiðlarnar. Talan er bæði um børn, ung og vaksin, ið venda sær til Dátueftirlitið antin við at ringja ella senda teldupost, fyri at biðja um ráð og vegleiðing. Í flestu førum snúgva fyrispurningarnir seg um trupulleikar á Facebook, har stórur partur av borgarunum í Føroyum hava vangamynd. Her kann t.d. verða spurt hvørjar myndir kunnu leggjast á netið, nær krevst samtykki til almannakunngerð av myndum, hvussu følsk vangamynd kann meldast o.s.fr. Eisini fær Dátueftirlitið javnan áheitanir um vegleiðing at melda sonevndar slaturbólkar á Facebook. Haraftrat er ein afturvendandi trupulleiki, at fólk kenna seg útspilt og ærumeidd á Facebook.

Hóast flestu fyrispurningar snúgva seg um Facebook eru eisini fyrispurningar um t.d. Instagram og SnapChat, samstundis sum tað eisini stundum kemur fyri, at falskar vangamyndir verða gjørdar á ymsum datingsíðum.

Fyri at veita eina góða tænastu til allar hesar borgarar, ið ynskja vegleiðing um sosialu miðlarnar, gjørdi Dátueftirlitið fyri nøkrum árum síðani av at seta í verk eina nýggja heimasíðu við heitinum “strikameg.fo”. Endamálið við hesi heimasíðu er at leggja eina rúgvu av vegleiðingum til borgararnar á síðuna, soleiðis at fólk sjálvi kunnu leita sær ráð á síðuni, ella finna rætta framferðarháttin at melda ein bólk ella strika eina vangamynd.




Dátueftirlitið fær eisini javnan skrivligar fyrispurningar frá næmingum úr ymsum skúlum í Føroyum. Talan er vanliga um fólkaskúlanæmingar, ið skriva uppgávu, sum spyrja Dátueftirlitið um nýtslu og misnýtslu av interneti og sosialum miðlum.

## 3.1. EFTIRLIT

Í 2017 framdi Dátueftirlitið 8 skriviborðseftirlit. Dátueftirlitið hevur í 2017 raðfest sínar uppgávur soleiðis, at eftirlitið hevur sett seg í samband við stovnar og fyritøkur við tí fyri eygað at kanna, hvørt KT-trygd og mannagongdir ísv. viðgerð av persónsupplýsingum er í tráð við persónsupplýsingarlógina og trygdarkunngerðina. Raðfestingin varð gjørd, tí Dátueftirlitið hevði vitan um, at neyðugt er støðugt at gera dátuábyrgdarar varugar við tey krøv, sum lóg og kunngerð seta til handfaringina av persónsupplýsingum. Og sigast má, at Dátueftirlitið ásannar, at hetta arbeiðið er neyðugt, tí í mongum førum hevur verið neyðugt at geva dátuábyrgdarum boð um at gera umfatandi tiltøk, til tess at skipa viðgerðina av persónsupplýsingum á lógligan hátt. Dátueftirlitið ásannar, at hesin arbeiðsháttur er komin fyri at vera, og at hann er eitt gott arbeiðsamboð hjá hesum stovni sæð í mun til uppgávurnar, sum eru at røkja.

## 3.2. HAGTØL

Upplýsingarnar í hesum partinum av ársfrágreiðingini eru grundaðar á skrásetingina av nýggjum málum í journalskipanini hjá Dátueftirlitinum fyri 2017, og eru sostatt bara viðvíkjandi nýggjum málum. Ein stórur partur av málunum hjá Dátueftirlitinum er ofta framhald av gomlum málum, t.d. broytingar í givnum loyvum ella fráboðanum. Hesi mál eru ikki tikin við í hetta yvirlitið, sum bara snýr seg um mál, sum eru stovnað í 2017.

## MYND 1. Bólking av málum 2013 - 2017

Mynd 1 niðanfyri vísir talið av málum og munnligum fyrispurningum frá 2013 til og við 2017. Talið á stovnaðum málum í 2017 var 217, og talið á munnligum fyrispurningum var 118.






## MYND 2. Bólking av nýstovnaðum málum í 2017 í tølum



## MYND 3. Málsbýti í prosentum í mun til myndugleikar, fyritøkur o.t. 2016/2017

Á mynd 3 sæst, at tað í stóran mun eru almennir myndugleikar, privatar fyritøkur og privatpersónar, sum venda sær til Dátueftirlitið.




Í 2017 vóru tølini hesi:

| | |
|---|---|
| Almennir myndugleikar, stovnar o.t. | 94 |
| Privatar fyritøkur, virkir, áhugabólkar o.t. | 44 |
| Privatpersónar | 37 |
| Kommunur | 14 |
| Fjølmiðlar | 2 |
| Innanhýsis | 23 |
| Annað | 3 |
| Íalt | 217 |

## MYND 4. Málsbýti í mun til evnisbólkar

Á mynd 4 sæst, hvussu málini eru býtt upp í teir ymsu evnabólkarnar.




Málini kunnu í høvuðsheitum býtast upp á hesar evnisbólkar:

| | |
|---|---|
| Vakmyndatól | 46 |
| Gransking | 41 |
| Starvsfólkaviðurskifti | 3 |
| KT-trygd | 15 |
| Sosialar netsíður | 6 |
| Ummæli/hoyring | 14 |
| P-tøl | 2 |
| Eftirlit | 15 |
| Mál viðvíkjandi lógini generelt | 43 |
| Innanhýsis mál | 21 |
| Upplýsing og fyribyrging | 3 |
| Innlit | 2 |
| Annað | 6 |
| Íalt | 217 |

## 3.3. MUNNLIGIR FYRISPURNINGAR

Í 2007 byrjaði Dátueftirlitið at skráseta munnligar fyrispurningar, sum vórðu avgreiddir um telefon. Í hesum bólki eru bara skrásettir fyrispurningar, har borgarar ella myndugleikar fáa beinleiðis vegleiðing umvegis telefon, og tað ikki snýr seg um samskifti í sambandi við verandi ella komandi mál.

Í 2017 vórðu 118 munnligir fyrispurningar skrásettir. Á myndini niðanfyri sæst, hvussu teir munnligu fyrispurningarnir, sum vóru avgreiddir í 2017, kunnu bólkast.

### MYND 5. MUNNLIGIR FYRISPURNINGAR




**Málsbýti í mun til myndugleikar, fyritøkur, privatpersónar, kommunur og advokatar:**

| | |
|---|---|
| Almennir myndugleikar, stovnar o.t. | 43 |
| Privatar fyritøkur, virkir, áhugabólkar o.t. | 26 |
| Privatpersónar | 39 |
| Kommunur | 9 |
| Fjølmiðlar | 3 |
| Íalt | 118 |

***Almennir myndugleikar, stovnar o.t.***

Fyrispurningarnir í hesum bólki hava serliga verið um, nær og hvussu ymisk skráseting er loyvd, nær talan er um viðkvæmar persónsupplýsingar, og nær tað er loyvt at víðarilata persónsupplýsingar sambært persónsupplýsingarlógini. Í einstøkum førum er talan um, at skúlar hava vent sær til Dátueftirlitið, har spurt verður um myndir og videobrot á netinum. Ein afturvendandi spurningur hjá almennu myndugleikunum er, hvussu reglurnar eru fyri nýtslu av p-talinum, um samankoyring av upplýsingum í ymiskum skráum, um innlit og ymiska starvsfólkaskráseting. Fyrispurningarnir í sambandi við starvsfólkaskráseting hava ofta snúð seg um, hvussu ella undir hvørjum umstøðum og treytum ein arbeiðsgevari kann fáa atgongd til ymiskar upplýsingar um síni starvsfólk. Tað kann t.d. vera upplýsingar úr teldupostskipanini hjá viðkomandi starvsfólki og loggur av heimasíðuvitjan. Talan kann harafturat verða um at fáa atgongd til starvsfólkaupplýsingar hjá fólki, ið eru í starvi, í sambandi við uppsagnartilgongd og hjá fólki, ið eru farin úr starvi.

***Privatar fyritøkur, virkir, áhugabólkar o.t.***

Flestu fyrispurningar frá privatum fyritøkum í 2017 snúðu seg um vakmyndatól og um nýtsluna av hesum. Eisini hava nógvir fyrispurningar verið um p-talið, har spurt verður nær p-talið kann nýtast. Harafturat vóru eisini nógvir fyrispurningar frá arbeiðsgevarum um viðgerð av persónsupplýsingum í starvsfólkaviðurskiftum, har arbeiðsgevarar ynskja at vita, hvørjar reglur eru galdandi viðvíkjandi eftirkanning av heimasíðunýtslu hjá starvsfólki, innlit í teldupostsamskifti hjá starvsfólki, nýtslu av sosialum netmiðlum o.s.v. Ein partur

VIRKSEMI Í ÁRINUM 2017

av hesum fyrispurningum um viðurskifti millum arbeiðsgevara og arbeiðstakara, hava snúð seg um viðgerð av persónsupplýsingum, tá starvsfólk er farið úr starvi. Eisini er spurningurin um sportøkni, serliga í akførum og arbeiðsmaskinum, nakað, ið tíðum verður spurt um.

***Privatpersónar***

Teir flestu fyrispurningarnir frá privatum borgarum snúgva seg um ymisk viðurskifti viðvíkjandi sosialum netmiðlum. Spurt verður t.d. hvussu ein bólkur ella følsk vangamynd kann meldast, hvat er at gera ísv. útspilling á netinum, hvussu vangamynd hjá deyðum brúkara verður strikað o.s.v. Nógv teir flestu fyrispurningarnir viðvíkjandi sosialum netmiðlum hava snúð seg um Facebook. Nógvir fyrispurningar frá privatum borgarum hava somuleiðis snúð seg um p-talið, og nær ein dátuábyrgdari hevur rætt til at skráseta hetta. Harafturat hava nógvir fyrispurningar verið um granskingarverkætlanir og um at fáa viðgerðarloyvi frá Dátueftirlitinum. Fyrispurningar hava eisini verið frá persónum, ið eru farnir úr starvi, og sum vilja vita, um arbeiðsgevarin kann nýta tilfar og upplýsingar, sum liggja í teldupostskipanini hjá viðkomandi. Eisini hava nakrir fyrispurningar verið um vakmyndatól á arbeiðsplássinum, sum t.d. nær tað er loyvt at hava vakmyndatól og undir hvørjum treytum, og um nýtslu av andlitsmyndum og støðumyndum.



***Kommunur***

Fyrispurningarnir frá kommunum í 2017 hava í høvuðsheitum snúð seg um nýtsluna av p-tølum hjá borgarum, har kommunurnar ynskja at vita, um p-talið kann skrásetast og undir hvørjum treytum. Eisini hava onkrir fyrispurningar snúð seg um víðarilatan av persónsupplýsingum, og undir hvørjum treytum hetta kann gerast. Eisini hevur spurningurin um trygt samskifti millum stovnar, myndugleikar og borgarar verið viðgjørdur.

***Miðlar***

Fleiri fyrispurningar eru eisini komnir frá fjølmiðlum. Talan var um spurningar um ymisk viðurskifti frá tíðindabløðum, internetportalum, útvarpi og sjónvarpi. Miðlarnir vendu sær til Dátueftirlitið m.a. viðvíkjandi logging, sosialum netmiðlum og flutningi av upplýsingum til útlond, skráseting og vakmyndatól.

## 3.4. LOYVIR OG FRÁBOÐANIR

Ein av høvuðsuppgávunum hjá Dátueftirlitinum sambært § 37 í persónsupplýsingarlógini, er at viðgera umsóknir um loyvir og fráboðanir.

***Viðgerðarloyvi:***

Eitt viðgerðarloyvi er eitt loyvi frá Dátueftirlitinum um, at viðkomandi stovnur,

felag, persónur ella annar hevur loyvið at viðgera ávísar viðkvæmar persónsupplýsingar til eitt ávíst endamál og undir ávísum treytum. Viðgerðarloyvir eru oftast tíðaravmarkað. Søkjast kann um loyvi við at útfylla eitt oyðublað á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum, og senda tað inn um heimasíðuna ella við postinum. Í høvuðsheitum krevst loyvi frá Dátueftirlitinum til eina viðgerð, tá viðkvæmar persónsupplýsingar verða viðgjørdar, tó eru undantøk til hesa reglu. Viðkvæmar persónsupplýsingar eru upplýsingar um: lit og ættarslag, um átrúnaðarliga, heimsspekiliga ella politiska sannføring, um revsiverd og kynslig viðurskifti, heilsustøðu, yrkisfelagsligt tilknýti, munandi sosialar trupulleikar og onnur heilt privat viðurskifti. Í kunngerð nr. 2 frá 25. februar 2004 um undantøk frá reglunum um viðgerðarloyvi, eru ásett ymisk undantøk til reglurnar um viðgerðarloyvi.

***Fráboðan:***

Tá viðgerðarloyvi ikki krevst til eina viðgerð, skal henda tó sum meginregla fráboðast Dátueftirlitinum. Hetta merkir, at Dátueftirlitið skal hava eina frágreiðing um, at viðkomandi ætlar at viðgera ávísar persónsupplýsingar. Ein fráboðan kann gerast við at útfylla eitt oyðublað (fráboðanarskjal) á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum, og senda tað inn um heimasíðuna ella við postinum. Fráboðanin skal latast Dátueftirlitinum í seinasta lagi 30 dagar, áðrenn viðgerðin er ætlað at byrja. Ein kunngerð er gjørd við undantøkum til fráboðanarskylduna. Hetta merkir í høvuðsheitum, at um persónsupplýsingar, sum ikki eru viðkvæmar, verða viðgjørdar, skal henda viðgerð ikki fráboðast Dátueftirlitinum. Flestu fráboðanirnar, sum Dátueftirlitið hevur fingið hetta árið, hava snúð seg um umsóknir um viðgerðarloyvir og fráboðanir.

### 3.4.1. Loyvi til verkætlanir

Dátueftirlitið hevur í 2017 givið loyvi til ymiskar verkætlanir. Av hesum verkætlanum kunnu m.a. nevnast hesar:

### 3.4.2. Verkætlan: Tidlig indsats mod perinatal angst og depression på Færøerne – en tværsektorel Shared Care-organisering

**Dátuábyrgdari:** Landssjúkrahúsið (Sanne Storm)

**Endamál:** Endamálið við verkætlanini er, sambært umsóknini, “At i sin helhed at sætte fokus på en tidlig opsporing og indsats mod perinatal angst og depression”.

**Háttur:** Upplýsingarnar verða savnaðar við spurnabløðum og ymsum testum.

**Viðgerðarloyvi:** Loyvið er galdandi til 1. mars 2018.

### 3.4.3. Verkætlan: Einkjustøðan hjá eldri í Føroyum

**Dátuábyrgdari:** Fróðskaparsetur Føroya (Elsa Johannesen)

**Endamál:** Endamálið við verkætlanini er, sambært umsóknini, at varpa ljós á einkjustøðuna hjá kvinnum og monnum í Føroyum, til tess at fáa eina fatan av, hvussu eldri persónar uppliva tað at gerast einkja/einkjumaður. Endamálið við hesum er at avdúka møguligar tørvir á røkt og stuðli, sum í løtuni ikki verður nøktaður.

**Háttur:** Lýst varð eftir luttakarum á Facebook.

**Viðgerðarloyvi:** Loyvið er galdandi frá 13. desember 2017 til 30. apríl 2018.

### 3.4.4. Verkætlan: Forsagnir um heilsu og andsevnir hjá eldri føroyingum

**Dátuábyrgdari:** Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu (Maria Skaalum Petersen)

**Endamál:** Endamálið við verkætlanini er, sambært umsóknini, at kanna heilsustøðu og andsevnir hjá eldri fólki, sum luttóku í líknandi granskingarverkætlan fyri 10 árum síðani. Endamálið er sostatt at samanbera støðuna nú við støðuna fyri 10 árum síðani

**Háttur:** Upplýsingarnar verða útvegaðar frá Cosmic, við samtykki frá teimum skrásettu.

**Viðgerðarloyvi:** Loyvið er galdandi frá 1. november 2017 til 1. november 2022.

### 3.4.5. Verkætlan: Registarakanning: Demens epidemiologi í Føroyum

**Dátuábyrgdari:** Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu (Maria Skaalum Petersen)

**Endamál:** Endamálið við verkætlanini er, sambært umsóknini, at gera eina skrá yvir demenstilburðir í Føroyum. Talan er bara um hagfrøðiliga viðgerð av upplýsingunum.

**Háttur:** Upplýsingarnar stava frá sjúkradagbókum á demensdeildini á Landssjúkrahúsinum.

**Viðgerðarloyvi:** Loyvið er galdandi til 1. september 2022.

### 3.4.6. Verkætlan: Egenomsorg og hjertesvigt

**Dátuábyrgdari:** Landssjúkrahúsið (Katrin á Lakjuni)

**Endamál:** Endamálið við verkætlanini er, sambært umsókini, at kanna "patientens egenomsorg i forhold til deres patientforløb".

**Háttur:** Spurnakanning.

**Viðgerðarloyvi:** Loyvið er galdandi frá 7. november 2017 til 1. februar 2018.

### 3.4.7. Verkætlan: Parkinson sjúka í Føroyum – ein langtíðarkanning

**Dátuábyrgdari:** Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu (Maria Skaalum Petersen)

**Endamál:** Endamálið við verkætlanini er, sambært umsókini, at gera eina kohortu við sjúklingum, avvarðandi og kontrollum, umframt at finna orsøkir til Parkinson-sjúku, bæði við atliti til ílegur og lívsstíl/umhvørvi hvør sær og í samspæli við hvørt annað. Afturat hesum verður tað kannað, um ílegur hava ávirkan á sjúkugongdina, og hvussu heilivágurin virkar hjá tí einstaka sjúklinginum.

**Háttur:** Ein partur av upplýsingunum, verkætlanin fevnir um, stavar frá Ílegusavninum. Hin parturin av upplýsingunum verður gjøgnum kanningar savnaður inn av Mariu Skaalum Petersen.

**Viðgerðarloyvi:** Loyvið er galdandi til 1. august 2025.

### 3.4.8. Verkætlan:
### Demens/Alzheimers sjúka í Føroyum – ein genetisk, umhvørvis og ættarbands kanning

**Dátuábyrgdari:** Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu (Maria Skaalum Petersen)

**Endamál:** Endamálið við verkætlanini er, sambært umsóknini, at gera eina kohortu við sjúklingum, avvarðandi og kontrollum, umframt at finna orsøkir til Demens/ Alzheimers-sjúku, bæði við atliti til ílegur og lívsstíl/umhvørvi hvør sær og í samspæli við hvørt annað. Afturat hesum verður tað kannað, um ílegur hava ávirkan á sjúkugongdina, og hvussu heilivágurin virkar hjá tí einstaka sjúklinginum.

**Háttur:** Ein partur av upplýsingunum, verkætlanin fevnir um, stavar frá Ílegusavninum. Hin parturin av upplýsingunum verður gjøgnum kanningar savnaður inn av Mariu Skaalum Petersen.

**Viðgerðarloyvi:** Loyvið er galdandi til 1. juli 2020.



### 3.4.9. Verkætlan:
### Verkætlanin er ein samstarvsverkætlan millum Heilsu- og umsorganartænastuna hjá Tórshavnar kommunu og Sjúkrafrøðideildina á Setrinum í Føroyum

**Dátuábyrgdari:** Fróðskaparsetur Føroya

**Endamál:** Endamálið við verkætlanini er, sambært umsóknini, at "fáa eitt yvirlit yvir hoyrn og sjón og ljósviðurskifti í heimunum".

**Háttur:** Upplýsingarnar verða savnaðar við kanningum.

**Viðgerðarloyvi:** Loyvið er galdandi til desember 2022.

### 3.4.10. Verkætlan:
### Deskriptiv tvørsnitkanning, spurnablaðskanning

**Dátuábyrgdari:** Landssjúkrahúsið (Laila Havmand og Marja Gjógvará)

**Endamál:** Endamálið við verkætlanini er, sambært umsóknini, at "lýsa nøgdsemi millum innlagdar sjúklingar á psykiatriskari seingjardeild. Harumframt verður spurnakanningin nýtt sum liður í granskingarsamstarvi við Psychiatric Research Centre (Ørebro) til validering av spurnablaðnum".

**Háttur:** Upplýsingarnar verða, sambært umsóknini, útvegaðar við samtykki frá teimum skrásettu, og verða viðgjørdar sum kategoriir og/ella miðaltøl.

**Viðgerðarloyvi:** Loyvið er galdandi til 31. juni 2018.

## 3.4.11. Verkætlan: Ændringer i kropsvægt, livskvalitet, muskelstyrke og dagligdags aktiviteter

**Dátuábyrgdari:** Landssjúkrahúsið (Poula Patursson)

**Endamál:** Endamálið við verkætlanini er, sambært umsóknini, at "undersøge, om en intervention med uafhængige kosttilskud eller en intervention, der kombinerer kosttilskud og styrketræning, er mere effektiv til at forhindre tab af muskelmasse end standardbehandling i kirurgiske patienter efter udledning".

**Háttur:** Upplýsingarnar verða útvegaðar frá teimum skrásettu.

**Viðgerðarloyvi:** Loyvið er galdandi til 1. juli 2020.

## 3.4.12. Verkætlan: BiFaSeps Biomarkers Faroe Islands Sepsis study



**Dátuábyrgdari:** Landssjúkrahúsið (Shahin Gaini)

**Endamál:** Endamálið við verkætlanini er, sambært umsóknini, at kanna viðurskifti í sambandi við lívshóttandi infektiónir.

**Háttur:** Upplýsingarnar verða útvegaðar frá teimum skrásettu umvegis spurnabløð, blóðroyndir og upplýsingum skrásettum í Cosmic skipanini.

**Viðgerðarloyvi:** Loyvið er galdandi til 1. mars 2017.

## 3.4.13. Aðrar verkætlanir, sum ikki hava kravt loyvi frá Dátueftirlitinum

Dátueftirlitið hevur í 2017 viðgjørt aðrar verkætlanir, har niðurstøðan hjá Dátueftirlitinum hevur verið, at loyvi frá Dátueftirlitinum ikki krevst til viðkomandi verkætlanir. Talan hevur verið um verkætlanir, har persónar ikki kunnu eyðmerkjast og um verkætlanir, har viðkvæmar persónsupplýsingar ikki hava verið viðgjørdar.

## 3.4.14. Ílegusavnið (Fráboðaðar granskingarverkætlanir)

Ílegusavnið varð sett á stovn við løgtingslóg nr. 62 frá 17. mai 2005 um gransking í mannaílegum (Ílegulógin), og í §§ 3-5 og 7 hevur Ílegusavnið lógarheimild at viðgera viðkvæmar persónsupplýsingar.

***Í 2017 hevur Ílegusavnið fráboðað hesar verkætlanir:***

- Identifying susceptibility genes associated with hereditary breast and ovarian cancer (HBOC) syndrome in the faroese population.
- Familier hyperkolesterolemi í Føroyum.

## 3.5. HOYRINGAR

### 3.5.1. Lógaruppskot

Dátueftirlitið hevur í árinum fingið hesi lógaruppskot til hoyringar:

- Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar “Anordning om ikraft-træden for Færøerne af lov om ændring af lov om psykologer m.v.”
- Dagført uppskot til broyting í løgtingslóg um lestrarstuðul
- Ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar “Anordning om ikrafttræden for Færøerne af ændringslove til lov om luftfart”
- Uppskot til løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi
- “Høring vedrørende bekendtgørelser til psykologloven”
- BRRD lógarpakkin
- CLR-fyriskipanin til hoyringar í Føroyum
- Uppskot til broyting í ílegulógini
- Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um lestrarstuðul
- Uppskot til løgtingslóg um veiðigjald
- “Lovforslag om krav til sikkerhed for net- og informationssystemer i sundhedssektoren”

### 3.5.2. Kunngerðir

Dátueftirlitið hevur í árinum fingið hesar kunngerðir til ummælis:

- Kunngerð um veiðidagbøkur
- Uppskot til kunngerð um broyting í kunngerð um lestrarstuðul

### 3.5.3. KT-politikkur

Almennir myndugleikar hava í árinum vent sær til Dátueftirlitið við fyrispurningum um ymiskt í samband við KT-trygd og KT-politikk yvirhøvur. Dátueftirlitið hevur í hesum sambandi kannað, um KT-politikkurin er í tráð við persónsupplýsingarlóggávuna, og annars vegleitt og ráðgivið um ymisk viðurskifti í hesum sambandi.

## 3.6. Vegleiðingar

Dátueftirlitið leggur stóran dent á at framleiða vegleiðingar fyri ymisku økini, sum liður í tí fyribyrgjandi arbeiðinum. Á heimasíðuni www.dat.fo eru allar vegleiðingarnar at finna.

# :://4 ÁVÍS ÚTVALD MÁL Í 2017

## 4.1. YMISK MÁL

Í hesum partinum av ársfrágreiðingini er ein stutt lýsing av einstøkum útvaldum málum í 2017.

### 4.1.1. Trygt samskifti hjá kommunulæknum, sjúkra húsum o.ø.

Dátueftirlitið vendi sær í 2017 til Heilsu- og Innlendismálaráðið tí at Dátueftirlitið í sambandi við eftirlitsarbeiði sítt hjá kommunusamstørvunum á eldraøkinum, hjá kommunulæknunum og sjúkrahúsunum var komið fram á, at trúnaðarupplýsingar, sum eru persónsupplýsingar, sum eiga at vera vardar fyri, at almenningurin fær innlit í tær, ikki verða handfarnar soleiðis, sum persónsupplýsingarlógin og trygdarkunngerðin áseta. Hetta serliga, tá talan var um § 11, stk. 3, í trygdarkunngerðini, sum ásetir, at *"Persónsupplýsingar, sum verða fluttar elektroniskt við flutningsmiðlum uttan fyri fysiska eftirlitið hjá dátuábyrgdara, skulu bronglast ella tryggjast á annan hátt, um trúnaður er neyðugur"*, tí tað vísti seg, at trúnaðarupplýsingar vórðu sendar um telefax og í ókrypteraðum telduposti. Tá so er, er vandi fyri, at hesar persónsupplýsingar koma á skeivar hendur, og/ella at óviðkomandi fáa innlit í tær.

Hesa niðurstøðu er Dátueftirlitið komið fram til í sambandi við, at eftirlitið hevur umbiðið trygdarskoðanir frá eldraøkjunum, tá hesi vórðu løgd út til kommunurnar at umsita. Eisini hevur Dátueftirlitið umbiðið trygdarskoðan frá Landssjúkrahúsinum.

Heilsu- og Innlendismálaráðið svaraði Dátueftirlitinum, at ráðið varðar av sjúkrahúsunum, og at Heilsutrygd, sum er stovnur undir ráðnum, er setanarmyndugleiki, meðan kommunurnar hava ábyrgdina av hølum og útbúnaðinum hjá kommunulæknunum. Tí helt ráðið seg onga ávirkan hava á, hvussu samskiftið hjá hinum pørtunum, heruppií kommunulæknunum, verður skipað.

Dátueftirlitið var ikki samt í hesari niðurstøðu, tí stovnur undir Heilsu- og Innlendismálaráðnum er setanarmyndugleiki hjá kommunulæknunum. Avtala varð síðani gjørd við Heilsutrygd um, at gjørdar verða mannagongdir fyri handfaring av persónsupplýsingum, og at allar læknaviðtalur í Føroyum skulu fáa hesar og boð um at skipa fyri, at kommunulæknarnir og starvsfólk teirra skulu arbeiða eftir hesum mannagongdum. Kommunurnar syrgja fyri, at upplýsingarkervið lýkur treytirnar í trygdarkunngerðini, heruppií at alt samskifti um teldupost, sum fer út um egið net, er krypterað.

Dátueftirlitið hevur eisini vent sær til Kommunulæknafelag Føroya og Kommunufelagið í hesum sambandi.

Eftirlitið hjá Dátueftirlitinum hevur ført við sær, at arbeitt hevur verið fram ímóti, at nýtslan av telefaksi skal halda uppat. Arbeitt verður eisini við, at samskifti um teldupost skal gerast trygt millum sjúkrahúsini, eldraøkini, kommunulæknarnar og viðskiftafólkini hjá hesum stovnum, og hava allir partar fingið

boð um at samskifta trygt. Øll eldraøkini og øll 3 sjúkrahúsini hava váttað, at samskift verður á tryggan hátt nú, og at telefaks ikki longur verður nýtt. Kommunulæknaviðtalurnar í Føroyum hava fingið boð um at lata Dátueftirlitinum trygdarskoðan av samskiftiskervinum í seinasta lagi hin 1. juni 2018. Harvið fær Dátueftirlitið váttanir um, at eisini kommunulæknaviðtalurnar handfara persónsupplýsingar í samsvari við persónsupplýsingarlógina og trygdarkunngerðina.

### 4.1.2. Viðgerð av viðkvæmum persónsupplýsingum

Tá heilsustøða hjá persónum verður viðgjørd, er talan um viðkvæmar persónsupplýsingar.

Ein fyritøka, ið útvegar hoyritól til viðskiftafólk síni, fekk frá Dátueftirlitinum boð um, at til tess at útinna hetta virksemi í samsvari við persónsupplýsingarlógina er neyðugt, at fyritøkan søkir Dátueftirlitið um loyvi til at viðgera viðkvæmar persónsupplýsingar, tí felagið skrásetti upplýsingar um hoyrn hjá viðskiftafólkum sínum. Talan er um skráseting av hoyrikurvum.

Dátueftirlitið bað í hesum sambandi um váðameting, trygdarpolitikk og ymsar leiðreglur fyri handfaring av persónsupplýsingum. Eisini móttók Dátueftirlitið avrit av dátuviðgerðaravtalum, sum fyritøkan hevði gjørt við sínar undirveitarar.

Dátueftirlitið viðgjørdi málið, og fyritøkan fekk eftirfylgjandi loyvi at viðgera viðkvæmar persónsupplýsingar.

### 4.1.3. Sportøkni í bussum

Eitt mál viðvíkjandi sportøkni í bussum tók sína byrjan við, at ein persónur ringdi til Dátueftirlitið og greiddi frá, at hann hevði fingið trupulleikar í starvssetan sínari, tí at arbeiðsgevarin hevði sportøkni í bussinum og vildi vera við, at ferðin hjá bussinum hevði verið ov høg, meðan viðkomandi koyrdi bussin.

Dátueftirlitið setti seg í samband við arbeiðsgevaran og greiddi frá, at tað er viðgerð av persónsupplýsingum um til ber at skráseta starvsfólk umvegis sportøknina, og at persónsupplýsingar vórðu nýttar í sambandi við starvssetanarrættarlig viðurskifti hjá starvsfólkunum.

Heitt varð á arbeiðsgevaran um at greiða Dátueftirlitinum frá, hvørt hetta var rætt og í játtandi føri at upplýsa, á hvørjum heimildargrundarlagi hetta varð gjørt. Eisini skuldi arbeiðsgevarin senda eftirlitinum skjalfestar mannagongdir fyri nýtslu av sportøkni í bussunum, umframt avrit av KT trygdarpolitikki, avrit av seinastu trygdarskoðan virkisins, umframt skjalfestar mannagongdir fyri handfaring av persónsupplýsingum á stovninum.

Stjórin á fyritøkuni játtaði í skrivi yvir fyri Dátueftirlitinum, at sportøkni bleiv nýtt í bussunum, men at fyritøkan ikki átti bussarnar, tí leiðirnar, sum bussarnir koyra, eru útveittar og verða riknar av sjálvstøðugum vinnurekandi. Hesi vinnurekandi eiga rakstrargøgnini, og eru eisini arbeiðsgevarar hjá teimum, ið koyra bussarnar. Fyri at bøta um tænastustøði, setti fyritøkan fyri einum góðum ári síðani fram ynski til busseigararnar um at seta sportøkni í bussarnar. Hetta bleiv gjørt soleiðis, at fyri-

tøkan bert fær upplýsingar um sjálvan bussin og hvussu hesin ferðast. Fyritøkan veit ikki, hvør koyrir ein ávísan buss til eina ávísa tíð, og hevur heldur ongan áhuga í at vita hetta.

Fyritøkan hevði tískil ikki mett tað neyðugt at útvega eitt serligt heimildargrundarlag.

Dátueftirlitið setti seg síðani í samband við allar busseigararnar og spurdi, um sportøkni bleiv nýtt í teirra bussi og um so var, at greiða frá, hvussu hendan sportøknin varð nýtt, um persónsupplýsingar vórðu viðgjørdar, og í játtandi føri, hvat heimildargrundarlagið var fyri tílíkari viðgerð av persónsupplýsingum. Eisini greiddi Dátueftirlitið frá, at tað ikki ber til lógliga at nýta sportøkni í starvssetanarrættarligum høpi í hesum førum.

Allir busseigararnir váttaðu skrivliga yvirfyri Dátueftirlitinum, at teir ikki nýta sportøknina til at viðgera persónsupplýsingar.

### 4.1.4. Fyrispurningur frá skúla um víðarilatan av persónsupplýsingum

Ein skúli vendi sær til Dátueftirlitið, tí hann frá einum felagið hevði fingið fyrispurning um at lata persónsupplýsingar hjá næmingum víðari til teirra.

Skúlin vildi vita, um tey høvdu loyvi at lata slíkar upplýsingar víðari, heilt ella partvíst, og um tey í so fall skuldu søkja um loyvi til hetta.

Dátueftirlitið svaraði skúlanum, at hesin hevði savnað inn persónsupplýsingar um næmingarnar við tí endamáli fyri eygað, sum skúlin lógliga hevði, tað er at skráseta og eyðmerkja hesar persónar sum næmingar skúlans í einum ávísum tíðarskeiðið, til tess at útbúgva teir sambært lógargrundarlagi skúlans.
Tað merkir, at skúlin ikki – uttan serliga heimild - lógliga kann lata øðrum, og heldur ikki umrødda felagið, hesar persónsupplýsingar.

Tað serliga heimildargrundarlagið, ið nevnt er her, kann vera eitt nágreinað og kunnað samtykki sambært § 2, nr. 8, í persónsupplýsingarlógini, frá hvørjum einstøkum næmingi.

At samtykki skal vera nágreinað og kunnað merkir, at viðkomandi skal hava greitt at vita, hvat persónsupplýsingarnar verða nýttar til, og at viðkomandi til eina og hvørja tíð kann taka sítt samtykki aftur.

### 4.1.5. Skráseting av oljutangum

Umhvørvisstovan setti ein fyrispurning til Dátueftirlitið í sambandi við, at tey vóru í ferð við at orða eitt uppskot til eina kunngerð um oljutangar, har ætlanin var at áseta, at allir oljutangar í Føroyum verða skrásettir í eini felags skrásetingarskipan fyri oljutangar.

Umhvørvisstovan helt, at einfaldasti mátin at fáa skrásett allar oljutangar var, at allir eigarar vórðu álagdir at skráseta tangan, og einfaldasti mátin at gera hetta uppá, var at fáa avrit av kundaskránni hjá oljufeløgunum.

Umhvørvisstovan umhugsaði at gera eina áseting í kunngerð, sum álegði oljufeløgunum at lata kundaskránna, antin til Umhvørvisstovuna sum landsmyndugleika, ella til kommununa, sum eftir ætlanini skuldi hava eftirlitið, og sannlíkt kom at umsita

skrásetingarskipanina. Umhvørvisstovan vildi vita, um heimild var fyri at gera ein slíka áseting. Dátueftirlitið setti Umhvørvisstovuni ymsar spurningar, herundir hvør lóg heimilar teimum at gera eina slíka kunngerð, umframt at um borgarar hava skyldu til at skráseta oljutangar, so er nokk ikki neyðugt at fara til oljufeløgini eftir upplýsingunum.

Umframt eru eisini krøv í § 8 í persónsupplýsingarlógini til tílíka viðgerð.

Umhvørvisstovan svaraði Dátueftirlitinum, at talan var um umhvørvisnevndarlógina, sum ikki heimilar Umhvørvisstovuni at fáa upplýsingar úr t.d. kundaskráum, og heldur ikki at biðja um upplýsingar um eigaraviðurskifti.

Umhvørvisstovan ásannaði, at ikki ber til at áseta í kunngerð, at eigarar skulu lata upplýsingar um tangan, ella at oljufelag skuldu lata teimum ella kommununum sínar kundaskráir.

Málið endaði við, at Dátueftirlitið upplýsti Umhvørvisstovuni, at um tey skuldu hava atgongd til kundaskránna hjá oljufeløgunum, má heimildin helst fáast til vega við lóg, ella við samtykki frá hvørjum einstøkum eigara av oljutanga.



### 4.1.6. Myndatøkur í sambandi við ítróttarvenjingar

Ein fyritøka, sum hevði ætlanir um at seta upp eina skipan í sambandi við ítróttarvenjingar, vendi sær til Dátueftirlitið. Fyritøkan spurdi um møguleikan at stroyma beinleiðis frá einum dysti/kapping.

Skipanin, sum hevur 5 vakmyndatól, skal taka upp ítróttarvenjingar á fótbóltsvøllum, í ítróttarhallum o.l.

Dátueftirlitið svaraði fyritøkuni, at eftirlitið aftaná viðgerð av málinum kom til ta niðurstøðu, at upptøkurnar, sum skipanin kundi hugsast at fevna um, ikki eru at meta sum vakmyndaeftirlit, tí endamálið við hesum upptøkum er ikki at hava eftirlit við øki ella ogn dátuábyrgdarans, ella við persónum.

Hetta merkir m.a., at feløgini ikki skulu senda Dátueftirlitinum fráboðan um vakmyndaeftirlit. Tað merkir tó ikki, at skipanin als ikki hevur avbjóðingar í mun til persónsupplýsingarlógina.

Í tann munn leikarar kunnu eyðmerkjast á upptøkunum, er talan um elektroniska viðgerð av persónsupplýsingum, sum er fevnd av persónsupplýsingarlógini. Tískil verður tað neyðugt hjá feløgunum at biðja um samtykki frá leikarum og øðrum, ið luttaka aktivt á upptøkunum. Fevna upptøkurnar um persónar, yngri enn 18 ár, skulu foreldur/verjar at hesum hava givið samtykki vegna persónarnar. Somuleiðis eigur atgongdin til upptøkurnar av venjingum at vera avmarkað til ávísar persónar í hvørjum felagi, t.d. venjaratoymið.

Tá dystir úr bestu fótbóltsdeildini verða tiknir upp og/ella sendir beinleiðis, verða áskoðarar harafturat fevndir av upptøkunum. Neyðugt verður tó ikki at biðja um samtykki frá hvørjum einstøkum áskoðara, tí talan verður um støðumyndir, heldur enn andlitsmyndir, hóast tað til tíðir óivað verður gjørligt at eyðmerkja áskoðarar.

Dátueftirlitið setti fram krav um, at tey feløg, ið hava ætlanir um at brúka skipanina, frammanundan veita limum felagsins kunning um, at skipanin verður tikin í nýtslu. Hetta kann t.d. gerast á aðalfundi, ella umvegis heimasíðu felagsins. Dátueftirlitið kravdi eisini, at tað verða sett upp sjónlig skeltir á ítróttarøkinum til tess at kunna fólk um, at tað verða gjørdar upptøkur á økinum.

Fyritøkan varð kunnað um, at sum veitarar av tænastuni áliggur tað teimum í ein ávísan mun at tryggja, at nýtslan av tænastuni er í samsvari við persónsupplýsingarlógina.

### 4.1.7. Vakmyndatól á Tórsvølli

Dátueftirlitið fekk fráboðan frá Fótbóltssambandi Føroya (FSF) í sambandi við, at ætlanir vóru um at seta upp vakmyndatól á Tórsvølli, sum skuldu vísa áskoðaraøkini inni á stadion og inngongdir til stadion.

Endamálið við vakmyndaskipanini var sambært fráboðanini at betra um trygdina á Tórsvølli í sambandi við landsdystir og størri tiltøk.

Dátueftirlitið spurdi í hesum sambandi, um FSF skal lúka nakrar serligar reglur hjá FIFA/UEFA viðvíkjandi trygd á Tórsvølli.

FSF svaraði, at felagið, sum fyriskipari av altjóða landsdystum, skal yvirhalda treytir settar av UEFA, og at tey áður hava fingið undantaksloyvi frá hesum krøvum, men nú hava fingið boð um, at halda hesar treytir heilt.

Dátueftirlitið bað í hesum sambandi um skjalprógv fyri, at UEFA ikki longur vildi góðtaka, at Tórsvøllur ikki lýkur viðkomandi treytirnar.

FSF upplýsti, at tað ikki hevur havt nakað skrivligt undantak frá UEFA viðvíkjandi vakmyndatólum á stadion, men at støðan heldur hevur verið, at UEFA ikki áður hevur handhevjað kravið um vakmyndatól mótvegis FSF.

FSF upplýsti harumframt, at nýggju vandarnir, ið hava verið at sæð til altjóða fótbóltsdystir seinastu árini, (yvirgangsatsóknir og vaksandi harðskapur millum fótbóltsáskoðararar), hava ført við sær, at UEFA nú krevur, at allir leikvallir, ið verða nýttir til A-landsdystir, Champions League og Europa League, skulu hava nýmótans vakmyndatólsskipan.

Dátueftirlitið fekk síðani sendandi skermmyndir frá FSF.

Samskift var síðani um, hvussu vakmyndatólini skulu vísa, fyri at vera lóglig, og skuldi okkurt vakmyndatól flytast í hesum sambandi.

FSF fekk eftirfylgjandi loyvi til at taka umrøddu vakmyndatól í nýtslu, og bleiv í hesum sambandi álagt teimum at seta sjónlig skeltir upp til tess at gera vart við eftirlitið, hetta tí vakmyndaeftirlitið á Tórsvølli er rættiliga víðfevnt.

### 4.1.8. Skráseting av tjóðskapi hjá starvsfólki

Eitt virki setti fram fyrispurning til Dátueftirlitið, um tey kunnu skráseta tjóðskap hjá teirra starvsfólkum.

ÁVÍS ÚTVALD MÁL Í 2017

Endamálið við skrásetingini var, at virkið vildi hava eitt yvirlit yvir útlendsku starvsfólkini í sambandi við undirvísing av útlendingum í føroyskum, sum virkið ætlaði at bjóða hesum starvsfólkum.

Dátueftirlitið svaraði virkinum, at upplýsing um uppruna og tjóðskap ikki er ein viðkvom persónsupplýsing sbr. § 2, nr. 9, í persónsupplýsingarlógini, men tað er harafturímoti upplýsingin um ættarslag.

Tað merkir, at upplýsing um tjóðskap kann dátabyrgdari – í hesum føri arbeiðsgevarin – viðgera, um heimildargrundarlag fæst til vega sbr. § 9 í somu lóg, og endamálið við viðgerðini er sakligt sbr. § 8 í persónsupplýsingarlógini.

Av fyrispurninginum framgekk, at endamálið er at kunna veita ávísum arbeiðsfólkum undirvísing í føroyskum máli. Hetta er at rokna sum sakligt endamál sambært lógini.

Fyritreytin fyri lógligari viðgerð er tó, at heimild fæst til vega, harvið, at tann einstaki skrásetti – arbeiðsfólkið – gevur sítt samtykki til, at upplýsingar um viðkomandi kunnu verða viðgjørdar við hesum endamáli fyri eygað.

Eitt tílíkt samtykki skal, sambært § 2 nr. 8, í persónsupplýsingarlógini vera kunnað, tað vil siga, at viðkomandi skrásetti skal geva sítt samtykki til, at skráseting av føðilandi fer fram, og verða kunnað um at endamálið er, at tilboð um undirvísing í føroyskum máli harvið kann verða givið viðkomandi.

### 4.1.9. Nýtsla ella víðarinýtsla av persónsupplýsingum

Ein kommuna vendi sær til Dátueftirlitið í sambandi við, at tey høvdu fingið fyrispurning frá einum stovni undir kommununi, sum ynskti, at kommunan sendi ein fyrispurning til Fólkayvirlitið um at fáa eitt yvirlit yvir borgarar, sum eru eldri enn 75 ár. Yvirlitið skuldi nýtast í teirra arbeiði at bjóða eldri borgarum tænastu. Stovnurin ynskti at fáa at vita navn, føðingardag og bústað hjá hesum borgarum.

Kommunan vildi vita, um tey høvdu heimild til at gera slíkan fyrispurning, og geva stovnunum úrslitið.

Dátueftirlitið svaraði kommununi, at eitt heimildargrundarlag í persónsupplýsingarlógini skal til, um upplýsingar skulu latast til almennar myndugleikar úr Fólkayvirlitinum.

Soleiðis sum málið var upplýst fyri Dátueftirlitinum, so varð ikki mett, at átakið er egnað at vera umfatað av nøkrum undantaki í persónsupplýsingarlógini. Heimildargrundarlagið skal tí helst finnast í meginreglunum um samtykki, sum er at finna í § 9 í persónsupplýsingarlógini.

Um kommunan kann vísa á eitt samtykki frá borgarunum at nýta borgarans upplýsingar til hetta endamál, so vildi hetta verið nøktandi heimildargrundarlag til ætlaðu viðgerðina sambært § 9, stk. 1, í persónsupplýsingarlógini. Fyritreytin er tó, at skrásetti er førur fyri at geva eitt lógligt samtykki sambært § 2 nr. 8, í persónsupplýsingarlógini, tvs., at skrásetti skal vera fulllgreiður yvir, at talan er um samtykki til eina ávísa viðgerð av persónsupplýsingum, og hvat endamálið við hesari viðgerð er.

### 4.1.10. Innlit í samrøður og SMS hjá starvsfólkum, ið hava arbeiðstelefon

Ein telefyritøka upplýsti fyri Dátueftirlitinum, at tey javnan fingu fyrispurning frá arbeiðsgevarum, sum ynsktu innlit í útgangandi og inngangandi samrøður og SMS hjá starvsfólkum, sum hava arbeiðstelefon.

Telefyritøkan vildi hava Dátueftirlitið at greiða teimum nærri frá reglunum á økinum, og hvussu tær eiga at tulkast. Tey hugsaðu serliga um, hvørt inngangandi samrøður og SMS eru umfataði av rættinum til innlit.

Dátueftirlitið svaraði fyritøkuni, at persónsupplýsingarlógin hevur eina áseting, sum er § 15, ið viðvíkur telefonsamskifti og sjálvvirkandi skráseting av hesum.

§ 15 í persónsupplýsingarlógini skal skiljast í tí samanhangi, at tað er vorðið alsamt meira vanligt, at starvsfólk eisini nýta arbeiðstelefonir til privata nýtslu. Ásetingin skal tískil skiljast sum ein verja av privatlívinum hjá starvsfólkunum, og ein verja av privata samskiftinum hjá starvsfólkunum. § 15 er galdandi bæði fyri privatar og almennar arbeiðsgevarar.

Tað er bert sjálvvirkandi skráseting, sum er fevnd av §15, og sostatt er manuell skráseting loyvd.

Loyvt er at skráseta talið av útgangandi telefonsamrøðum og sms, og hvussu nógv talutíð verður brúkt, eins og loyvt er at skráseta telefonnummar, um 3 tey seinastu tølini í telefonnummarinum eru duld.

Um inngangandi telefonsamrøður sjálvvirkandi kunnu skrásetast velst um, hvørt viðgerðarheimild er til tess í § 8 í persónsupplýsingarlógin.

Tað er soleiðis bert hvønn nágreiniliga ringt verður til, sum er bannað at skráseta sjálvvirkandi.

Tílík skráseting krevur tískil loyvi frá Dátueftirlitinum, sambært § 15 í persónsupplýsingarlógini.

Viðvíkjandi § 15 í persónsupplýsingarlógini kann sostatt staðfestast, at greinin er ikki at skilja sum rættur hjá arbeiðsgevara til innlit í telefonsamskifti hjá arbeiðstakara. Arbeiðstakari kann geva arbeiðsgevaranum samtykki til sjálvvirkandi skráseting av telefonsamskifti, men eisini í hesum førum skal arbeiðsgevarin søkja um loyvi frá Dátueftirlitinum.

Skal arbeiðsgevari hava møguleika til sjálvvirkandi at skráseta, hvønn starvsfólk samskifta við, skulu altýðandi privat ella almenn áhugamál krevja tað, og søkjast skal um loyvi til tess frá Dátueftirlitinum.

Dátueftirlitið leggur undir viðgerðini um tílík loyvi dent á, hvørt heilt serligar umstøður gera seg galdandi, tvs. hvat endamálið við skrásetingini er, hvussu týðandi hetta er sæð í mun til persónsverndina, og um endamálið kann røkkast á annan hátt, enn við sjálvvirkandi skráseting.

Ovurnýtsla av telefon er ikki nóg góð grundgeving til tess at fáa loyvi, tí til ber hjá arbeiðsgevaranum at avmarka hesa nýtslu á annan hátt, enn við sjálvvirkandi skráseting.

Dátueftirlitið kann seta treytir fyri loyvinum. Arbeiðsgevari kann ikki umbiðja afturlítandi

útgreining av samskifti hjá starvsfólki, vísandi til § 15 í persónsupplýsingarlógini. Til tess krevst serlig lógarheimild.

Fær telefyritøka eina áheitan frá arbeiðsgevara um, at viðkomandi ynskir sjálvvirkandi skráseting av telefonsamskiftinum hjá starvsfólki, so skal fyrsta stigið hjá telefyritøkuni vera, at seta seg í samband við Dátueftirlitið. Tílík skráseting kann ikki fara fram uttan loyvi frá Dátueftirlitinum.

Arbeiðsgevari kann fáa útgreinaða rokning (innlit í útgangandi samrøður hjá starvsfólki), tá ið 3 tey seinastu tølini í nummarinum eru fjald.

Tá ið talan er um arbeiðsgevara/arbeiðstakara samband, og arbeiðsgevarin vil hava fult innlit í útgreinaðar rokningar, ella automatiskt vil skráseta samskifti, so skulu teleútbjóðararnir vísa hesum arbeiðsgevarum til Dátueftirlitið í sambandi við eina umbøn um loyvi.

Útbjóðarar av telesamskifti skulu eisini hava í huga, at sambært § 15, stk. 3, skulu útbjóðarar ikki senda nágreiniligar útgreinaðar rokningar, soleiðis at hetta hevur við sær, at haldarin fær upplýsingar hann ikki sjálvur kann skráseta sambært § 15, stk. 1.

### 4.1.11. Kæra um nýtslu av vakmyndatólum á bensinstøð

Dátueftirlitið móttók eina kæru frá foreldrunum at einari 17 ára gamlari gentu, sum arbeiddi á einari bensinstøð.

Kæran snúði seg í stuttum um, at eitt av starvsfólkunum á bensinstøðini umvegis vakmyndaeftirlitsskipanina, í eitt ávíst tíðarskeið ein dagin hevði hugt eftir vakmyndaupptøkum av gentuni, meðan hon var til arbeiðis.

Starvsfólkið hevði síðani greitt leiðaranum frá, hvat gentan tókst við, tað tíðarskeiðið viðkomandi hevði hugt í vakmyndaskipanina.

Kæran varð send leiðaranum á bensinstøðini til ummælis.

Leiðarin játtaði, at innihaldið í kæruni var rætt, og greiddi frá, hví viðkomandi starvsfólk hevði hugt í vakmyndaeftirlitsskipanina.

Starvsfólki hevði ikki hugt eftir vakmyndunum fyri at halda eyga við gentuni, men tí at ein bilur hevði koyrt á eitt skáp úti á forplássinum náttina fyri. Starvsfólkið vildi við vakmyndunum finna út av, hvat hent var.

Leiðarin hevur eftirfylgjandi tosað við leiðandi starvsfólk, allan starvsfólkahópin, umframt við gentuna og pápa gentuna um tilburðin.

Niðurstøða varð gjørd um, at reglurnar skuldu skerpast viðvíkjandi atgongdini til vakmyndaeftirlitsskipanina.

Frágreiðingin frá leiðaranum á bensinstøðini varð síðani send foreldrunum at gentuni, og vóru tey biðin um at siga frá, um tey høvdu viðmerkingar til hesa.

Tá foreldrini onga viðmerking høvdu til frágreiðingina, bleiv avgerð tikin í málinum, har Dátueftirlitið m.a. átalar tilburðin, sum viðkomandi starvsfólkið á bensinstøðini sýndi hendan dagin, við fráboðan um, at vakmyndatólsupptøkur ikki skulu nýtast til at halda eyga við starvsfólki.

## 4.2. MÁL TIKIN UPP AV EGNUM ÁVUM

Sambært § 37, stk. 1, nr. 1 í persónsupplýsingarlógini hevur Dátueftirlitið heimild til at taka mál upp av egnum ávum, og varð hetta í 2017 gjørt í fleiri førum, eins og sokallað skriviborðseftirlit vórðu framd.

:// Uppgávurnar hjá Dátueftirlitinum eru nógvar, og málsviðgerðin er fjøltáttað.



# ://5 ALTJÓÐA SAMSTARV

Tað, sum eyðkennir londini rundanum okkum, tá talan er um vernd av persónsupplýsingum, er eitt víttfevnandi altjóða samstarv. Hetta samstarv hevur stóran týdning, og er neyðugt orsakað av, at persónsupplýsingar ofta verða fluttar um landamørk.

Flestu grannalondini hava eins og Føroyar eina persónsupplýsingarlóg, ið er grundað á ES-fyriskipan 95/46EF um verju av likamligum persónum við viðgerð av persónsupplýsingum og frítt skifti av persónsupplýsingum millum lond. Meginreglan í hesi fyriskipan er, at viðgerð skal vera í samsvari við grundleggjandi persónsverndaratlit sum persónsfrælsi og heimafrið hins einstaka. Eisini skal viðgerð av persónsupplýsingum virka til frama fyri øktari trygd hjá tí einstaka, og øktum samhandli landanna millum.

Tá tað snýr seg um at flyta persónsupplýsingar millum lond, býtir ES-lóggávan londini upp í limalond og triðjalond. Persónsupplýsingar kunnu flytast millum limalondini í Evropasamveldinum, tí hesi hava somu trygdarstig. Snýr tað seg hinvegin um triðjalond, so hevur ES-nevndin býtt hesi lond upp í trygg og ótrygg triðjalond. Trygg triðjalond eru lond, sum kunnu tryggja eins góða trygd fyri persónsupplýsingum, sum ES-londini gera, og á heimasíðuni hjá ES-nevndini er ein listi yvir triðjalond, sum eru góðkend sum trygg triðjalond. Rættiliga strangar treytir eru hinvegin fyri flutningi av upplýsingum til triðjalond, sum ikki hava slíka góðkenning.

Innlendismálaráðið setti í 2005 eina kunngerð í gildi, har flutningur av persónsupplýsingum til øll ES-lond og tey londini, sum ES-nevndin hevur lýst sum trygg triðjalond, ikki krevur loyvi frá Dátueftirlitinum, men skal fráboðast Dátueftirlitinum. Føroyar hava á hendan hátt, eins og ES, góðkent øll ES lond og lond, sum ES hevur lýst sum trygg triðjalond.

## 5.1. TRIÐJALANDSGÓÐKENNING FRÁ ES NEVNDINI

Innlendismálaráðið søkti í 2005 ES-nevndina um at góðkenna Føroyar sum eitt trygt triðjaland í persónsupplýsingarhøpi. Síðani hevur verið arbeitt við málinum, og í 2010 komu boðini um, at ES-nevndin hevur góðkent Føroyar sum eitt trygt triðjaland.

Dátueftirlitið fegnast um ES góðkenningina, sum í høvuðsheitum merkir, at ES metir trygdarstøðið í Føroyum vera á jøvnum føti við trygdarstøðið í ES londum, tá tað snýr seg um viðgerð av persónsupplýsingum. Hetta merkir samstundis, at ES viðurkennir Føroyar sum eitt land, sum verjir grundleggjandi demokratisk rættindi í einum nútímans talgildum samfelag.

Triðjalands góðkenningin hevur við sær, at Føroyar nú koma á listan yvir trygg triðjalond millum m.a. Ísland, Noreg og Sveits. Góðkenningin kemur at hava stóran týdning fyri føroyska samfelagið, og fer at gera tað lættari hjá føroyskum fyritøkum, herundir peningastovnunum, at samskifta við útheimin.

# ://6 EFTIRLIT

Góðkenningin fer somuleiðis at hava týdning fyri gransking og ætlanirnar at fáa útlendskar granskarar til Føroyar at granska, fyri møguleikan hjá føroyskum fyritøkum at marknaðarføra seg uttanlands, og fyri ætlanirnar at bjóða Føroyar fram sum altjóða hosting miðdepil.

Avgerðin um at góðkenna Føroyar sum eitt trygt triðjaland kom í gildi tann 15. juni 2010.




Dátueftirlitið er ein eftirlitsmyndugleiki, sum skal tryggja, at persónsupplýsingarlógin verður hildin, og Dátueftirlitið hevur í hesum sambandi heimild til at gera kanningar á staðnum, og hevur til eina og hvørja tíð uttan dómsskurð, atgongd til øll høli, haðani persónsupplýsingar verða viðgjørdar ella goymdar, og til øll høli har persónsupplýsingarnar ella teknisk hjálparamboð verða goymd ella nýtt.

Dátueftirlitið kann harumframt m.a. áleggja einum dátuábyrgdara at fremja tøknilig og fyrisitingarlig trygdartiltøk, kann nokta einum dátuábyrgdara at nýta ávísan framferðarhátt og kann krevja, at dátuábyrgdari steðgar viðgerð, sum er brot á lógina.

101010


010101




# Dátueftirlitið

Dátueftirlitið verjir tínar persónsupplýsingar

www.dat.fo